# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Farvæl

## Til minnis um Edmund Jensen

26.01.87 - 07.09.08




*Edmund og Frans*

Tárini tey runnu,
Tá eg mín bróður fann,
Eg rópti til Guð!
Tak heldur meg, enn hann.

Eg kíni tínar kynnar,
So kaldir teir tykjast mær,
Eg kann næstan ikki fata,
Tú er farin frá mær.

Í dreyminum tú segði,
Tú mást stóla upp á meg,
Hóast tað er svárt,
Eg geri alt hettar fyri teg,
Tú var meira enn ein bróður,
Tú var alt fyri meg,
Á hvat eg ynskti at tú visti,
Hvussu nógv eg elski teg.

Eg sakni at hoyra tína rødd,
Eg sakni títt blíða bros,
Tíni friðarkendu eygu,
Og okkara seru tos.

So svárt tað er at liva,
Nú tú er farin herfrá,
Eg veit at einki verður aftur,
Sum tað var tá.
Eg má liva lívið,
Eg má finna frið,
Eg má liva við tí tanka,
Tú verður aldrin aftur við mína lið.

Farvæl mín bróður,
Og takk fyri tað tú var,
So inntil vit síggjast aftur,
Eitt síðsta »Farvæl«

*Orð: Frans Jensen 21. okt. 09*

✝

## Andlát og jarðarferðir

**Jákup Hansen, Klaksvík**, andaðist á hospitalinum í Århuus hósdagin, 55 ára gamal.

**Jógvan Pætur Gilsstein, Klaksvík,** andaðist hóskvøldið á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, 78 ára gamal.

# Tøkk

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu, tá kæra mamma, vermamma og omma okkara

**Elsa Maria Fanny Anthoniussen**

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til Hanus Simonsen, prest, fyri troystarrík orð, tá kistan kom heim í kirkjuna, og til jarðarferðina. Tøkk til Ólavur, mammubeiggja, fyri vakran sang til mammu okkara á hennara seinasta hvíldarstað. Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur, og fyri hjálp og stuðul til jarðarferðina og ervið. Tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Sigfríður, Eina, Hans David, Axel, Elisabeth, Hans Vilhelm og Anthon**

# Fimm feitar flugur



*Tær fimm f.v.: Lív Dam, Jórunn Dánialsdóttir, Erla Matras Jensen, Mikkalina Norðberg og Durita Dam, saman við Paula Nielsen, sum eigur gamla Ullvøruhúsið og eisini selur bøkur har*

*Jens Kristian Vang*

Í morgin, týsdagin 1. desember kl. 10, letur jólahandilin “Fimm feitar flugur” upp í miðbýnum í Havn. Handilin er í N. Finsensgøtu, har sum Ullvøruhúsið var í mong ár.

Tað eru tær fimm: Mikkalina Norðberg, Jórunn Dánialsdóttir, Lív Dam, Erla Matras Jensen og Durita Dam, ið hava handilin, sum verður opin opin í jólamánaðinum.

Handilin selur listahandverk hjá teimum fimm, sum gera lutir úr leiri, tekstil, glasi, málningar, eins og smúkkur og mangt annað. Tær fimm siga, at talan er um ein handil við øðrvísi jólagávum. Alt er hondgjørt. Sjálvar nevna tær tað hjartagávur. Spurdar um navnið á handlinum siga tær, at hetta er ein øðrvísi handil, hví so ikki eisini hava eitt øðrvísi navn.

Opið er: mándag til fríggjadag frá kl. 10-17.30 og leygardag frá kl. 10-14. Í jólavikuni verður opið frá kl. 10-20. Handilin verður opin til og við mikudagin 23. desember.

*-mg*

# MERKISDAGAR

**Silvurbrúdleyp**
Sunnudagin 18. okt. høvdu Birgit og Hanus Hansen, klaksvík, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 12. des. kl. 19 í Badmintonhøllini í klaksvík. Tey sum ynskja at gleðast saman við silvurbrúðarparinum, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 227479 ella 455592. Ella við at skriva til: bsh@post.olivant.fo áðrenn 3. des.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 29. des. halda við bæði, Pálin og Henry Olsen, Rituvík okkara silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin við veitslu í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tit, ið ynskja at gleða okkum við at koma, kunnu siga frá á tlf. 219134 (Henry) ella 223534 (Pálin). Til ber eisini at senda ein teldupost: henry-o@olivant.fo ella palin.olsen@skulin.fo áðrenn 15. desember.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 1. des. hava hjúnini Andra og Hjørleif Zachariassen, Streymnes, silvurbrúdleyp. Tey verða burturstødd.

**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 5. des. kunnu hjúnini Edith og Páll Klettskarð, í Haraldssundi, halda gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Haraldssundi í millum kl. 12 og 17. Tey, ið vilja gleðast saman við okkum, eru hjartaliga vælkomin.

**Diamantbrúðleyp**
Fríggjadagin 4. des. hava Kirsten og Daniel Næs, Hvalba, diamantbrúðleyp. Tey, sum vilja heilsa uppa diamantbrúðarparið eru vælkomin hjá Monu og Eliesar, Toftavegur 15, frá kl. 14-19.

**Brúdleyp**
Fríggjadagin 4. des. kl. 10 giftast í Sørvágs kirkju, Tórgun Jørleifsdóttur úr Sørvági og Hans Petur Lamhauge av Skála. Dagurin verður hildin í missiónshúsinum Libanon í Sørvági frá 13-17, har øll eru hjartaliga vælkomin.